# Eitt slør á høvdið – ella á heilan?

ÚR AL-HAYAT
26. JUNI 2003
*Høvundur: Adunis*


*Heimskendi arábiski yrkijarin, Adunis, hevur skrivað hetta innleggið*

Hugsandi um tað áhaldandi kjakið í tekur seg upp í Fraklandi serliga, og í øðrum vesturlendskum londum, generelt:

1. Líkamikið, hvussu ymisk sjónarmiðini viðvíkjandi slørinum hjá tí muslimsku kvinnuni eru, so er tað møguligt at siga, at tey eru ikki annað enn ein bunki av tulkingum. Tað er eingin skrift, ið áleggur slørið – eins og tey átrúnaðarligu viðgongdu vilja vera við. Tað er ein frágreiðing til viðmerkingarnar, ið gjørdar eru. Men er tað rætt, átrúnaðarliga talað, at hesar frágreiðingar koma uppá eitt lógar- og lógargevandi støði?

Tó, hetta málið við slørinum heldur á fram við at vera kontroversielt. Hvør hevur rætt ella magt til, at áleggja sína egnu tulking á øll fólk og loyva sær sjálvum at brúka harðskap fyri at fáa sín vilja ígjøgnum, ikki bara mótvegis kvinnum, men eisini móti teimum, ið eru ósamd við teimum og øllum samfelagnum?

Orsakað av, at málið um slørið er eitt sera gamalt kjakevni í islamiskum samfeløgum, ið, generelt, ikki eru siviliseraði, kunnu vit skilja trupulleikan og fløkjuna, sum tey viðgongdu islamistisku standpunktini skapa í siviliseraðu vesturlendsku samfeløgunum, sum aftur skapa fleiri trupulleikar, ið skaða muslimarnar í hesum umtalaðu samfeløgum – sum einstaklingar og skaða sjálvt Islam, sum eina visjón um menniskjað og heimin, ein sjálvan og hin. Tann mest einfalda hugmyndin er tann at innflutti muslimurin, serliga tann, ið hevur sama nationalitet, sum landið hann livir í, skuldi vita hvar ein drøg markið millum privatu og tað almennu sferuna, millum privata trúgv og felags samfelagslig virðir. Faktiskt, skuldu øll lagt seg undir tey síðstnevndu virðini, serliga undir tær sivilu og útbúgvingarligu institutiónirnar. Muslimarnir, ið hanga seg í málið um slørið, áttu at vita at hetta áhaldnið, avdúkar at tey hava onga virðing fyri kenslum hjá øðrum, ið liva í sama samfelagi og at tey ikki trúgva hesum virðum og at tey hertaka teirra lív og gera gjøldur við teirra løgum, sum tey dýran og leingi hava stríðst fyri, og at tey forða ella nokta republikanskum demokratiskum hugtøkum, ið eru galdandi í júst tí landinum, sum gevur teimum arbeiði og frælsi. Tey áttu at viðgingið, at hetta áhaldnið, um slørið, er meiri enn eitt brot á eina atferð, ið loyvir fleiri vesturlendingum at síggja hetta sum eina hertøku.

2. Summi vilja vera við, at muslimska kvinnan í vesturheiminum velur at ganga í slørinum frívilјað. Hetta er opið til at kjakast um, men ikki júst nú. Men, tá vit, í París til dømis síggja ungar gentur, ið eru minnið enn fýra ár ganga við slør, kunnu vit tá siga at tær ganga við tí við fríum vilja? Hvat er fríur vilji hjá eini fýra ára gamlari gentu? Hví síggja teir viðgongdu muslimsku innflytararnir í frælsinum, sum teir koma til, einans hættir at almannakunngera sína isolatión og teirra migratión innaní immigratiónini? Teir liva í hesum londum orsakað av júst hesum frælsinum. Tískil, tá teir kunngera teirra trúgv ella, tá teir útføra trúnna við sløri ella skeggi, ella báðum, tá forbróta teir seg fyrst og fremst móti Islam, tí teir niðurgera tess virðir við hesum yvirfladisku formalitetunum og vísa tað fram við einum súmboli, ið leggur Islam fram sum einans eitt yvirfladiskt ritual. Er tað soleiðis muslimar skulu framleggja Islam í hesari øldini – Islam, sum í fleiri øldir stóð sum ein varði fyri kreativiteti og útstráling? Síggja tey ikki, at tey, við teirra atferð, »sløra« Islam, at tey goyma tess andlit og harvið avskepla og køva tað?

Tey, ið rópa fyri at áleggja og innføra slørið, eru ein minniluti í vest og millum muslimarnar í arabiska heiminum. Um tað at ganga við sløri varð sett til eitt demokratiskt val, vildi tað væl og virðiliga fallið. Hesin minnilutin, ístaðin fyri at virða fólkaræðið og tess lógir í vest, hevði verið ein skipan lív og roynir at áleggja síni trúvirðir omanyvir, ikki einans muslimar, men eisini fólkaræðinum sjálvum. Eg veit ikki, hvussu mann umskyldar ella verjir hendan hugburð, ella, um mann kundi brúkt tað til nakað ella, um tað hevði verið eitt veruligt úttryk av Islam.

Ein og hvør persónur, ið kannar eftir sakliga og neyvt, sær partisanarnir fyri slørinum ikki sum átrúnaðarligar menn, men sum politikarar. Sannleikin er, at allar sannroyndir vísa á, at hesin minnilutin er politiskur, og at muslimar og vesturlendingar áttu at vent sær til hann sum ein politiskan flokk og ikki sum eina átrúnaðarliga eind.

3. Moskan er einasta staðið har muslimurin er privilligeraður í vesturheiminum (soleiðis skuldi tað eisini verið í arabisku londunum). Tað er tað einasta staðið har hann kann útføra hansara fullu trúarrættindir. Einhvør praksis uttan fyri hesar veggir, socialt ella alment, er eitt álop á felagsvirðir. Institutiónin, serliga tann útbúgvingarliga, sum skúlar og lærdir háskúlar, er eitt alment og felags stað. Eitt stað, har tað ikki átti at verið nøkur privat átrúnaðarlig tekin, líkamikið hvat tey skuldu verið. Vit leggja afturat institutiónini, gøtuna, kaffihús, biografar, klubbar og almennar konferanshøllir. Nærveran av átrúnaðarligum samleikateknum á hesum støðum er eitt brot á teirra týdningar og endamál. Tað er eitt brot á tann einasta, ið tilhoyrir tí felags unika samleikanum. Tað er eitt súmbol um seperatiónsviljan og ein noktan av integratión. Tað er ein staðfesting av tí annarleiðis privata samleikanum, innanfyri monotheistiska almenna samleikanum. Hetta er ein avbjóðing fyri almennu kensluni, almenna dáminum, almennu mentanini og almennum morali.

Framkoman av eini áherðslu á tað privata í tí almenna er eitt slag av teatur umboðan, ið ikki hóskar átrúnaðinum. Átrúnaðarliga upplivingin er grundað á intimitet, eitt slag av loyndarleika, einfaldni, tøgn og isolatión, burtur frá allari útsjónd. Um nøkur mótmælir eru móti muslimsku kvinnuni, ið ber slørið, í navninum á átrúnaðarligum frælsi, so er hesin rættur varðveittur og virdur so leingi sum hann er privatur, útførdur í hóskandi karmum. Um tað fer útum hetta mark, gerst tað til eina meiri aggressiva atgerð á hin; vanvirðandi meiningina, tankar og kenslur hjá hinum. Hetta er, í atløgu til at forsmáa sivilar almennar lógir og tær megnar royndir og ofringar, ið gjørdar eru til frama fyri veruleikagera tær.

4. Tá Abbasid kaliffarnir* góvu boð um, at ikki muslimar skuldu ganga við teknum fyri at skilja teir at frá muslimum, var tað ein forbanning, og tað var eisini eitt tekin um afturgongu og stagnatión. Men hetta hvarv skjótt við útviklingini av samfelagnum. Tað er løgi og trupult at skilja, hví summir muslimar í vesturheiminum ganga við sløri og skeggi fyri at atskilja seg frá restini av samfelagnum teir liva í. Hetta áhaldni er ein atgerð á teirra søgu, ein forbanning av henni, teirra mentan og teirra tilveru í heiminum. So, tað sýnist fyri áskoðarinum, at slørið ikki einans er eitt brot á løg og mentan hjá hinum, men tað er ein sjálv-rannsakan og eitt annað aspekt av lívinum – í ørmum deyðanna.

5. Samanumtikið, sigi eg, at átrúnaðarliga tulkingini, ið áleggur slørið á muslimsku kvinnuna – sum livir í einum lógar- og rættar landi, ið atskilir millum átrúnað og politik og trýr á javnstøðu millum mann og kvinnu við atliti til teirra rættindir og skyldur – avdúkar eitt sinni, sum ikki einans goymir kvinnuna, men eisini menniskjað og samfelagið og lívið. Tað slørar vitið og skilið. Tað er ein tulking, ið gevir fleiri í vesturlondunum orsøk at síggja í tí eina roynd at broyta tey virðir, ið sett eru eftir stórt stríð fyri frælsi, rættvísi og javnstøðu. Tey eiga at síggja í tí, eitt krav um at strika leiklutin hjá kvinnuni í tí samfelagsliga, mentanarliga og politiska almenna lívinum, sum fullkomiliga mótsigur løgunum í sivila lívinum í Evropa og vesturlondunum. Tað er ein tulking, ið roynir at fáa bæði, og gera tey um til amboð í tænastuni hjá dominerandi maskinaríum, ið verða stýrd av einum blindum harðræði.

** Abbasid kaliffarnir:*

*Formella Abbasidríkið var frá 750-1258.*
*Tann gylti tíðaraldurin er fyri arábarunum frá 700-900, í hesum tíðarskeiðinum var abbasiddiska høvuðssætið í Bagdad. Frá Atlantarhavinum við Norðafrika og Spania og so langt inn í vest asiatiska meginlandið, vóru muslimsku arabararnir teir leiðandi. Nógv skriftvirksemi fer fram og um tað ikki hevði verið fyri arabisku umsetararnar av grikskum og øðrum vísindaligum og bókmenta tilfarið, so hevði renesansan ikki verið tann sama.*

## Slørið – Hidjab

Hidjab er arábiska merkingin fyri slør. Rótin á arábiska orðinum, h-dj-b, merkir at dekka frá sýni ella goyma. Hetta er eitt klædnaplagg, sum dekkar høvd og kropp.

Tað, at kvinnur skulu goyma høvd og kropp við klædnaplaggi, verður nevnt í Koranini og í traditiónunum (hadith), hetta eru frásagnir um tað, ið profeturin hevur sagt og gjørt. Hesar skriftirnar eru eisini heilagar fyri muslimum.

Sum sagt, eru tulkingarnar av versunum, ið umtala slørið, deildar og ymiskar. Meiningarnar um, hvussu nógv slørið skal dekka, eru eisini deildar. Kapitulin og versið í Koranini, sum ofta verður víst til, tá spurt verður um slørið, er 33,59. Har stendur nakað soleiðis:

»O! Profetur, sig tínum konum, døtrum og kvinnunum hjá teimum trúgvandi, at tær skulu lata seg í teirra klæðir, ið dekka allan teirra kropp. Hetta hóskar seg betur, so tær kennast aftur og ikki koma illa fyri. Og Gud er fyrigevandi og miskunnsamur.«

ítróttur

Nr. 138 • hósdagur • 24. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Graslíki fær ein møguleika

**– UEFA fer at geva feløgum møguleika at spæla á graslíkisvølli um stutta tíð, tí at í fleiri londum er tað torført at hava ein góðan grasvøll alt árið, sigur fyrrverandi norski stórspælarin Rune Bratseth um graslíki**


*Graslíkið er framtíðin, vil onkur vera við. Føroysk feløg fara eftir øllum at døma at spæla sínar heimadystir í evropeiskum kappingum á sínum veruliga heimavølli heldur enn á Svangaskarði ella á Tórsvølli. Myndin er tikin av graslíkisvøllinum á Argjum Mynd:*
*Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Um nøkur fá ár kunnu vit vænta, at føroysk feløg kunnu spæla sínar heimadystir á graslíki. UEFA fer nevniliga skjótt at opna dyrnar fyri hesum møguleikanum.

– Tey seinastu signalini frá UEFA eru, at vit í 2005 fáa vit møguleika at spæla okkara Evropa Cup dystir á graslíki, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

Evropeiski felagsskapurin arbeiðir nevniliga miðvíst fram ímóti, at møguleiki skal vera fyri at spæla altjóða dystir á graslíki.

Hetta hevði sjálvsagt verið ein stórur fyrimunur fyri føroysk feløg, tí at allir dystir í Føroyum verða spældir á graslíki. Fótbóltssambandið hevur fleiri ferðir sett hetta ynskið fram í UEFA, men higartil hevur tað gingið heldur striltið.

### Positiv signal frá UEFA

Tað er greitt, at framleiðarar at graslíki hava gjørt stór framstig seinastu við at menna graslíki, so at tað líkist alt meira veruligum grasi. Hendan framgongdin hevur við sær, at UEFA skjótt kann geva grønt ljós fyri, at dystir verða spældir á kunstigum undirlagi.

UEFA hevur eitt sokallað "Players Panel", har fyrrverandi leikarar, sum hava spælt á hægsta stigi, gera sínar metingar um fótbólt í dag, og teir geva stjórnini í UEFA tilráðingar um ymisk viðurskifti.

Hetta pallborðið kom á sínum seinasta fundi til ta niðurstøðu, at UEFA eigur at geva feløgum møguleika at spæla á graslíki. Orsøkin til hetta er, at graslíkisvallirnir gerast alsamt betri, og um ungdómar fáa møguleika at spæla á hesum undirlagnum fer tað at gerast betri umtókt.

### Fá ár

Fyrrverandi norski landsliðsleikarin, Rune Bratseth, sum spældi við Werder Bremen í týsku bundesliguni, situr í panelinum hjá UEFA. Í dag er hann ítróttarstjóri í norska felagnum Rosenborg. Hann tekur undir við, at graslíki verður góðkent fyri altjóða dystir.

– UEFA fer at geva feløgum møguleika at spæla á graslíkisvølli um ikki so langa tíð, tí at í fleiri londum er tað torført at hava ein góðan grasvøll alt árið, sigur Rune Bratseth, sum tó ikki kann siga nágreiniliga, nær hetta fer at henda.

Hann nevnir í hesum sambandi, at komandi kappingarár fara norsk feløg at kunna spæla landskappingardystir á kunstigum grasi, og hann hevur frætt, at nøkur feløg fara at gera sær dælt av hesum møguleikanum, tá tað ikki er møguligt at spæla á grasi.

Hann leggur tó dent á, at tað altíð fer at vera betri at spæla á einum góðum grasvølli enn á einum graslíkisvølli.

– Allir framleiðararnir av graslíkisvallum arbeiða miðvíst við at betra um góðskuna, og tí kunnu vit nú tosa um at spæla landskappingar- og altjóða dystir á graslíki, sigur Rune Bratseth.

Ein annar fyrrverandi stórspælari, sum eisini situr í panelinum hjá UEFA, er fransmaðurin Jean-Pierre Papin, og hann er meira bersøgin.

– Kunstigt undirlag er framtíðin, er hann siteraður fyri at siga í bláðnum UEFA Direct, sum UEFA gevur út.

### FSF streingir á

Fótbóltssamband Føroya tekur sjálvsagt undir við uppskotinum um at loyva dystum á graslíki.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur, at hetta er nakað, sum teir hava kent til í fleiri ár, og Fótbóltssambandið hevur í fleiri ár borið hetta ynskið fram fyri UEFA.

Teir nýggjast vallirnir í Føroyum, sum eru í Klaksvík, Fuglafirði, Gøtu, Runavík og Skála, eru teir bestu, ið eru á marknaðinum í løtuni. Hesir vallirnir fáa óivað góðkenning um nøkur ár.

So er bara eftir hjá føroyskum feløgum at hava karmarnar í lagi, so at teir lúka øll mynsturkrøv hjá UEFA.

Ein av trupulleikunum hjá UEFA hevur verið, at felagsskapurin ikki vil hava monopol á marknaðinum fyri graslíki.

Hesin eini framleiðarin, sum hevur framleitt teir nýggjastu vallirnar í Føroyum, er langt frammanfyri sínar kappingarneytar, og um UEFA nú gevur grønt ljós fyri at spæla á graslíki, fer hesin veitarin at seta seg einaráðandi á marknaðin.

UEFA vil ístaðin geva øðrum framleiðarum møguleika at koma uppá sama støðið sum tann fremsti, áðrenn nøkur góðkenning verður givin. Tað skal vera ein av orsøkunum til, at UEFA bíðar við góðkenningini av kunstigum grasi.

### Ráðstevna um graslíki

Í hesi vikuni hava tey norðurlendsku fótbóltssambondini havt eina ráðstevnu um graslíki. Ráðstevnan var í Noregi, og Rúni Heinesen, nevndarlimur í FSF, hevur umboðað Føroyar á hesi ráðstevnuni.

Tíverri fingu vit ikki fatur á Rúna Heinesen fríggjamorgunin, men Ísak Mikladal sigur, at høvuðsevnið á ráðstevnuni var graslíki.

Ætlanin er at streingja á UEFA fyri at fáa góðkenning at spæla á graslíki.

2. DEILD

**Dystir hetta vikuskiftið**

B71 – AB
ÍF – B36
VB – B68
KÍ – Sumba
TB – LÍF

| | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MÁL MUNUR | STIG | HEIMA VUNNI | HEIMA JAVNT | HEIMA TAPT | HEIMA MÁL | ÚTI VUNNI | ÚTI JAVNT | ÚTI TAPT | ÚTI MÁL |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 10 | 7 | 2 | 1 | 19 | 7 | 12 | 23 | 5 | 0 | 0 | 15 - 4 | 2 | 2 | 1 | 4 - 3 |
| 2 Sumba | 10 | 6 | 3 | 1 | 22 | 5 | 17 | 21 | 3 | 2 | 0 | 14 - 1 | 3 | 1 | 1 | 8 - 4 |
| 3 TB | 10 | 6 | 1 | 3 | 25 | 16 | 9 | 19 | 5 | 0 | 0 | 16 - 5 | 1 | 1 | 3 | 9 - 11 |
| 4 VB | 10 | 5 | 1 | 4 | 19 | 13 | 6 | 16 | 3 | 1 | 1 | 12 - 4 | 2 | 0 | 3 | 7 - 9 |
| 5 KÍ | 10 | 5 | 1 | 4 | 21 | 30 | -9 | 16 | 4 | 0 | 1 | 11 - 6 | 1 | 1 | 3 | 10 - 24 |
| 6 AB | 10 | 3 | 4 | 3 | 19 | 16 | 3 | 13 | 3 | 2 | 1 | 15 - 8 | 0 | 2 | 2 | 4 - 8 |
| 7 B36 | 10 | 3 | 3 | 4 | 17 | 14 | 3 | 12 | 2 | 1 | 2 | 11 - 6 | 1 | 2 | 2 | 6 - 8 |
| 8 LÍF | 10 | 3 | 1 | 6 | 14 | 26 | -12 | 10 | 1 | 1 | 3 | 9 - 15 | 2 | 0 | 3 | 5 - 11 |
| 9 B71 | 10 | 2 | 1 | 7 | 14 | 16 | -2 | 7 | 2 | 1 | 1 | 12 - 2 | 0 | 0 | 6 | 2 - 14 |
| 10 B68 | 10 | 1 | 1 | 8 | 5 | 32 | -27 | 4 | 1 | 1 | 3 | 1 - 8 | 0 | 0 | 5 | 4 - 24 |